# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 28.11.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, og Ólavur Larsen

Varalimir: Leif André Eliassen fyri David Andreasen og Kristian Martin Petersen fyri Magna Jøkladal

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 42/24 | 24/00250-5 | Uppskot til ársfíggjarætlan 2025 |
| 43/24 | 23/00593-9 | Víðkan av tunnili til maskinrúm, trukkrúm og skrivstovu |
| **Til kunning** | | |
| | | |

**Til støðutakan**

**42/24**
**24/00250-5 Uppskot til ársfíggjarætlan 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 51/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 33/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.10.2024 | 61/24 |
| 4 Býráðið | 31.10.2024 | 40/24 |
| 5 Býráðið | 28.11.2024 | 42/24 |
| 6 Fíggjarnevndin | 05.11.2024 | 62/24 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2024 | 51/24 |
| 8 Vinnu- og havnanevndin | 14.11.2024 | 34/24 |
| 9 Mentamálanevndin | 20.11.2024 | 39/24 |
| 10 Tekniska nevnd | 14.11.2024 | 57/24 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.11.2024 | 64/24 |
| 12 Býráðið | | |
| 13 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 65/24 |

2

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býraðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar býráð skal í seinasta lagi 1. desember 2024 hava samtykt fíggjarætlanina fyri 2025.<br><br>Fyrisitingin hevur fingið inntøkumetingar frá TAKS fyri kommunuskatt, skatt av kapitaleftirlønum og skatt av DIS/FAS. Eftir er at meta um partafelagsskattin komandi árið. |

| | |
|---|---|
| | Á útreiðslusíðuni hevur umsitingin gjørt sær metingar av lønar- og prísvøkstri, so framskrivingar af útreiðslusíðuni kunnu gerast.<br><br>Fíggjarnevndin og harnæst býráðið skulu taka avgerð um bæði rakstrar og íløgukarm herundir, skattaprocent, barnafrádrátt og raðfestingar á ymisku rakstrarstøðunum.<br><br>Viðfest erui skjøl, sum verða grundarlag fyri viðgerðini í fíggjarnevndini.<br><br>**Til býráðsfundin 30.10.2024**<br>Eitt samlað býráð hevur viðgjørt fíggjarætlanina 2 dagar á uttanhýsis fundi eins og fíggjarnevndin 28. oktober 2024 hevur viðgjørt fíggjarætlanina.<br><br>Tað vísir seg at verða avbjóðingar at halda seg til samtykta rakstrarkarmin uppá 86,3 mió. kr. uttan at broyta tænastustøði í kommununi. Orsøkin er, at lønarhækkingarnar við seinastu lønarsamráðingum hækka lutfalsliga væl meir enn væntaðu inntøkurnar. Raksturin komandi ár er í núverandi uppskoti 88,5 mió. kr. ella góðar 2 mió. kr. hægri enn samtykti karmurin.<br><br>Løgurnar eru í núverandi uppskoti 36,2 mió. kr. sum er góðar 6 mió. kr. omanfyri samtykta karmin. Raðfestingarnar í komandi løguætlan eru í rundum tølum:<br><br>Øki 1 Fyrisiting: framhald av miðbýarætlan 2 mió kr.<br>Øki 2 Almanna og heilsumál: Ventilatión og neyðstreymur til Vesturstovu 435 tkr.<br>ØKi 3 Børn og ung: Sifta tak á Barnalund 1.5 mió. Kr.<br>Øki 4 Undirvísing: Umvæling av 64-skúlanum 4 mió. Kr.<br>Øki 5 Mentan og frítíð: Málgoymsla v.m 900 tkr. og Ítróttarhøllin á Kambsdali 600 tkr.<br>Øki 6 Teknisk mál: íalt 14,6 mió kr.<br>• Spillvatnsætlan 2 mió. Kr.<br>• Vegagerð 3,3 mió. Kr.<br>• Útstykkingar 4,4 mió. Kr.<br>• Kirkjugarðar 800 tkr.<br>• Vatnveiting á Hellunum 1 mió. kr.<br>• Gøtuljós 825 tkr.<br>• Vegir og gøtur á Hellunum 200 tkr.<br>• Gongubreyt á Kambsdali 250 tkr.<br>• Vatnveiting 500 tkr.<br>• Fríøki 200 tkr.<br>• El-løðistøð/Varandi orka 100 tkr.<br>Øki 7 Kommunalt virki: Bryggja sambært avtalu millum Fuglafjarðar kommunu og Havsbrún frá 2019, 10 mió. kr., umhvørvisøkið á Kambsdali 600 tkr. og brandbilur 1,9 mió. Kr. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Til 2. viðgerð á býráðsfundi 28.11.2024<br>Ímillum 1. og 2. viðgerð hava nevndirnar arbeitt við, at lækka útreiðslurnar til rakstur og løgur sambært býráðssamtyktini undir 1. viðgerð har avgjørt varð at skerja raksturin við íalt 450 tkr. og løgurnar við íalt 2,0 mió. kr. Á øki 2 og 3 er raksturin lækkaður 100 tkr. av hvørjari, meðan raksturin er lækkaður 50 tkr. á hvørjum av økjunum 1, 4, 5, 6 og 7.<br><br>Løgurnar til kommunala útstykking eru lækkaðar frá netto 4,4 mió. kr. til netto 2,4 mió. kr, í mun til 1. Við<br>gerð.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Sambært §16 1. petti í kommunustýrisskipanini hjá Fuglafjarðar kommunu skal uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár verða løgd fyri býráðið áðrenn 1. oktober. og endalig fíggjarætlan góðkennast við 2. viðgerð innan 1. Desember í inniverandi ári.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt: Kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• Møgulig fylgiskjøl:<br>• Notat um yvirskipaður karmar fyri fíggjarárið 2025<br>• Viðmerkingar til FÆ2025 samlað<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025 (version 1)Viðareiði<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025 (version 1)Viðareiði +1.v...<br>• øki 2 samla í eitt dokument<br>• øki 3 samla í eitt domument<br>• Tilfar til fíggjarætlan øki 4<br>• Tilfar til fíggjarætlan øki 5<br>• øki 6</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at fíoggjarnevndin tekur støðu til karmarnar fyri fíggjarárið 2025, sum verður lagt fyri býráðið til støðutakan.<br><br>Tilmæli til býráðsfundin 26.09.2024.<br>Mælt verður býráðnum til taka støðu til fylgjandi karmar:<br>• Skattaprosentið verður óbroytt 21,25%<br>• Barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Hendan hækkingin svarar samanlagt til umleið 192 tkr. í 2025.</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | • At raksturin verður framskrivaður við dagførdum lønarkarmi og lønarhækking uppá 4%, sum gevur ein netto rakstrarkarm á 86,3 mió. kr., sum er 3,3 mió. kr. hægri enn í 2024.<br>• At løgukarmurin verður 30 mió. kr. netto<br><br>Ólavur Larsen kom á fundinum við uppskoti um, at miða ímóti at lækka raksturin samanlagt við 450 tkr. og løgurnar við samanlagt 2,0 mió. kr.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 28.11.2024**<br>Meirlutin í Fíggjarnevndini Dávur Juul og Eyðun á Lakjuni mæla til fylgjandi karmar:<br>• Skattaprosentið verður óbroytt 21,25%<br>• Barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Hendan hækkingin svarar samanlagt til umleið 192 tkr. í 2025.<br>• At raksturin verður framskrivaður við dagførdum lønarkarmi og lønarhækking uppá 4%, sum gevur ein netto rakstrarkarm á 88,05 mió. kr.<br>• At løgukarmurin verður 34,2 mió. kr. netto<br>• At tær 12,9 mió. kr. sum er munur í samlaðu inntøkunum uppá 119,9 mió. kr. og samlaðu útreiðslunum uppá 132,7 mió. kr., verða fíggjaðar við tøkum peningi.<br>• At 7.550 tkr. av óbrúktum løgum í 2024 verða fluttar til 2025<br><br>Minnilutin í Fíggjarnevndini Ólavur Larsen, mælir í mun til omanfyristandandi frá meirilutanum, at lækka skattprosentið við 0.25%, svarandi til umleið 950 tkr. samanlagt og at hetta verður fíggjað við partafelagsskattinum. |
| Dagf | 20. september 2024 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Fíggjarnevndin 23. september 2024:**
Fíggjarnevndin mælir til, at skattaprosentið verður óbroyttur 21,25% og barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Mælt verður til at lønirnar verða dagførdar við lønarliftinum og síðani framskrivaðar við 4%. Á íløgusíðuni verða avsettar 30 mió. kr. netto.

**Býráðið 26. september 2024:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskot frá Sonna á Horni, um í mun til tilmælið frá fíggjarnevndini annars, at lækka skattaprosentið við 0,5 % til 20,75%. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri, Sheila S. Sóldal atkvøddi blankt og Eivind Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Sostatt fall uppskotið.

Síðani varð atkvøtt fyri tilmælinum frá fíggjarnevndini 23. september 2024. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið til Fíggjarætlan, sum fyrliggur. Samlaði raksturin er 88,5 mió. kr. og løgurnar eru 36,2 mió. kr. Hetta er omanfyri samtykta karmin og mælir fíggjarnevndin býráðnum til, at heita á nevndirnar um at fáa samlaða rakstrarkarmin undir 88 mió. kr. og samlaða íløgukarmin undir 30 mió. kr., áðrenn fíggjarætlanin kemur til 2. viðgerð.

**Býráðið 31. oktober 2024:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum. 6
Síðani atkvøddi býráðið um uppskotið frá fíggjarnevndini íroknað broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen. Býráðið tók einmælt undir við hesum.

**Tekniska nevnd 04. november 2024:**
Tekniska nevnd hevur gjøgnumgingið íløgurnar á rakstrarstaði 6 og kann taka 2mió av íløguni RS632 útstykking Innandalsvegur. Miða verður ímóti at útbjóðingartilfarið verður klárt um árskiftið og boðið út fyrst í 2025.

**Fíggjarnevndin 05. november 2024:**
Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskot um tillagingar í Fíggjarætlan 2025 frá Teknisku nevnd og Sosialu nevnd og tók undir við tillagingunum. Harafturat mælir fíggjarnevndin til, at taka 50 tkr. av RS110: «Býráð og nevndir» og at økini 4, 5, 6 og 7 taka 50 tkr. hvør av sínum rakstrarøki.

**Tekniska nevnd 14. november 2024:**
Tekniska nevnd viðgjørdi uppskoti um tillagingar í FÆ25 og tekur 20.000kr av lønir á RS672 og 30.000kr av lønir á RS650

**Vinnu- og havnanevndin 14. november 2024:**
Vinnu- og havnanevndin viðgjørdi uppskoti um tillagingar í FÆ25 og tekur 15.000kr av lønir á RS714, 25.000kr av RS745 (Vinnumenning) og 10.000 kr av lønir RS752

**Mentamálanevndin 20. november 2024:**

Nevndin mælir til at 25 tkr verða tiknar av 410 – 14 og 25 tkr av 414 – 14. Nevndin vil vísa á at kostnaðurin fyri skúlabarnaflutning til móttøkuflokk kemur at verða 165.000 kr fyri 10. mdr og hesin peningur er ikki avsettur. Nevndin mælir til at 25 tkr verða tiknar av 572 -11og 25 tkr av 550

**Fíggjarnevndin 25. november 2024:**
Fíggjarnevndin hevur uppskot um hesar útreiðsluneutralu tillagingar:
RS 520 Kvøldskúlin, Kvøld- og listaskúlar: Konto 21(inntøka), verður hækkað við 50 tkr.
RS 750 Fuglafjarðar havn, Havnir og lendingar: Konto 21(inntøka) verður hækkað við 115 tkr.
RS 410 Fólkaskúlin: Konto 14 (útreiðsla)verður hækkað við 165 tkr. vegna flutning av móttøkuflokkinum

Fíggjarnevndin mælir harafturat til, at hallið í fíggjarætlanini uppá umleið 12,7 mió. kr. verður fíggjað av innistandandi peningi.

Við hesum broytingum mælir Fíggjarnevndin býráðnum at taka undir við ársfíggjarætlanini fyri 2025.

Minnilutin Ólavur Larsen mælir harafturat til, at lækka skattin við 0,25%, sum svarar til eina inntøkulækking uppá 950 tkr, sum skal fíggjast av partafelagsskattinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið frá umsitingini um at flyta óbrúktar íløgur uppá netto 7.550 tkr. í 2024 til 2025. Orsøkin til at allur íløgupeningurin ikki er nýttur í 2024 er orsakað av at umbyggingin av 64-skúlanum er seinkað og av ymiskum verkætlanum, sum vórðu raktar av verkfallinum í vár.

Fíggjarnevndin tekur undir við, at netto 7.550 tkr. av óbrúktari játtan í 2024 verða fluttar til játtanina í 2025.

**Býráðið 28. november 2024:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið hjá Ólavi Larsen um, at lækka skattaprosentið við 0,25% frá 21,25% til 21,00%.

Sonni á Horni, Ólavur Larsen og Gudny Vang atkøddu fyri, Leif André Eliasen atkvøddi blankt, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Kristian Martin Petersen og Edva Jacobsen atkvøddi ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt fyri uppskotinum frá meirlutanum í fíggjarnevndini Dávur Juul og Eyðun á Lakjuni. Uppskotið varð einmælt samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

43/24

**23/00593-9 Víðkan av tunnili til maskinrúm, trukkrúm og skrivstovu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 14.11.2024 | 35/24 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 21.11.2024 | 36/24 |
| 3 Býráðið | 28.11.2024 | 43/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Bergfrost hevur sent ein fyrispurning til Fuglafjarðar kommunu um at fáa maskinrúmi, trukkrúm inn í goymslutunnlar, samstundis við at ynski er um at gera ein skrivstovubygning heimanfyri innkoyringina til nýggju tunnlarnar, sí tekningar.<br>Talan er um at spreingja heimeftir (N) frá nýggja atkomutunlinum, eitt økið sum er um 930 kvm í plan. Innkoyringin frá skrivstovubygninginum verður ein tunnil sum er 5m høgur og 5m breiður, annars verður goymslutunnilin 8,5m høgur og 16,5m breiður. Inni í tunlinum er ætlanin at gera maskinrúm, goymslurúm, verkstað og goymslu til trukkarnar.<br>Við at gera hendan tunnilin, verður alt maskinrúmið, sum í dag eru bingjur sum standa á havnalagnum, flutt inn. Og ístaðin fyri bingjurnar, verður ein skrivstovubygningur bygdur. Skrivstovubygningurin verður úr betongið og verður hesin viðgjørdur sum eitt byggimál verður viðgjørt, tá ið endaligar tekningar fyriliggja.<br>Um loyvið verður givið til at víðka tunnilin, er umráðandi at somu treytir verða givnar, sum áðrenn:<br>- At komandi tunlar skulu matrikkulerast. Víst verður til - Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.<br>- Byggiharrin kemur við nýggjum og neyvum tekningum og frágreiðingum bæði uppá tunlarnar og skrivstovubygningin. Og at tekningar og skjøl til skrivstovubygningin verða samb. ásetingunum um innsent tilfar til Fuglafjarðar kommunu, fyri viðgerð av byggimálum.<br>- Bruna- og tilbúgvingarætlan verður gjørd til allar tunlarnar, rúmini og skrivstovubygningin.<br>- Tunlarnir skulu gerast út við neyð- og rýmingarljósi, ávaringarskipan, CO2 følara og øllum følarum til nýtsluna, brunaskápum, UHF- sambandi.<br>- Neyðug luftskiftisskipan verður gjørd í allar tunlarnar. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | - Luftskiftis skipanin skal kunna virka sum brunaventilatión.<br>- Neyðugt geologiskt tilfar verður gjørt/fyriliggur áðrenn byrja verður, her man vera okkurt fyri núverandi tunlar.<br>- Tilfarið frá tunnilinum verður lagt á sama stað har núverandi tilfar verður lagt, annars eftir nærri avtalu við Fuglafjarðar kommunu<br>- At neyðugar tryggingar av arbeiðinum, herundir spreingi trygging sum longu er eisini er galdandi fyri hesar tunlarnar og at byggiharrin kannar hetta og sendir váttan til Fuglafjarðar kommunu tá ið tær fyriliggja.<br>- Neyðug krøv til spreingi tryggingina skulu gerast.<br>- At arbeiði ikki verður longri enn núverandi spreingiætlan so íbúgvarnir ikki verða tarnaðir longri enn lovað.<br>- Um óljóð og ristingar verður av maskinrúminum, sum ávirkar íbúgvarnar sum búgva omanfyri og í grannalagnum omanfyri, mugu hesar betrast so eingin ampi verður av hesum.<br><br>19.11.2024:<br>Tilfarið frá Jarðfeingi er latið kommununi og kann málið viðgerast av nýggjum í vinnu- og havnanevndini.<br><br>21.11.2024: Tíðarætlan fyri arbeiðið:<br>Vika 50 endar tann 15 Desember 2024. LNS ætlar at verða lidnir við Bergfrost og Havsbrún tann 20 Desember, eisini nýggja projektið hjá Bergfrost.<br>20 desember fara LNS í jólaferiu., og koma aftur tann 6. januar til at rigga av.<br>Um teir ikki hava klára at spreingja heilt liðugt innan 20 desember, so er tað bara smávegis eftir, tað verður so gjørt liðugt frá viku 2 í 2025.<br><br>26.11.2024:<br><br>Umsitingin og borgarstjórin hjá Fuglafjarðar kommunu hava haft vitjan av Jarðfeingi. Orsøkin til at vitjanin kom í lag, av tí at Fuglafjarðar kommuna hevur sent fyrispurning til Jarðfeingi um spreingingarnar hava haft jarðfrøðilig hjáárin í bygdini. 3 umboð frá Jarðfeingi vóru við á fundinum, sum vóru áhugaði í hví kommunan sendi hendan fyrispurningin. Kommunan greiddi frá trupulleikum við vatnið sum hava verið í seinastuni. Umboð frá jarðfeingi vístu á, at tað er ógvuliga trupult at staðfesta um tílíkir trupulleikar hava nakað beinleiðis við spreingingina at gera. Tey hava gjørt kanningar í samband við Húsareynstunnilin í Havnini har man ikki kundi ávísa jarðfrøðiligar broytingar í lendinum hóast ristingar av spreingingunum.<br>Viðvíkjandi víðari spreinging av tunlunum til Bergfrost til goymslu og maskinrúm, varð teirra viðmæli at flyta tunnilin eitt vet longur inn, longur burturfrá beninum. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Orsøkin til at málið verður lagt fyri, er at ynski er um at fáa sprongt nú meðan spreingjuarbeiði er í gongd, so hetta arbeiði verður liðugt áðrenn jól. Sambært § 32. Í kommunustýrislógini kann nevndarlimur, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:**<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br><br>**Møgulig fylgiskjøl:**<br>• Víðkan av tunnili til maskinrúm, trukkrúm og skrivstovu<br>• Bergfrost maskinrúm trukkarúm kontór Nov 2024.pdf<br>• Jarðfrøðiligar eygleiðingar frystitunlar í Fuglafirði.pdf<br>• E-000-010 A3<br>• B-100-134 A3<br>• B-000-100 A3<br>• D-200-250 A3<br>• C-200-250 A3<br>• D-100-200 A3<br>• C-100-200 A3<br>• D-000-100 A3<br>• C-000-100 A3<br>• A-100-113 A3<br>• A-000-100 A3 |

**Viðgerð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | N | N |
| | Umsitingarligar | N | N |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at um byggiloyvið verður givið, at tað verður við teimum treytunum sum standa í lýsingini.<br><br>Gudny Vang mælir til, at Bergfrost út yvir treytirnar, sum standa í málslýsingini eisini søkjir sær ráð hjá Jarðfeingi áðrenn og meðan hendan verkætlanin fer fram og fylgja teimum.<br><br>Eivin Breiðaskarð mæli til, at út yvir treytirnar í málslýsingini, verður álagt Bergfrost at endurhýsa teimum sum búgva í teimum tveimum húsinum beint omanfyri tunnilin, meðan arbeiði fer fram, um hesi ynskja tað. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 14.11.2024 |
|---|---|

**Vinnu- og havnanevndin 14. november 2024:**
Vinnu- og havnanevndin heitur einmælt á at umsetingin fær eina fakliga meting av hvørju hjáárin spreingiarbeiði hevur við sær áðrenn endalig støða kann takast í einum slíkum málið.

**Vinnu- og havnanevndin 21. november 2024:**
Vinnu- og havnanevndin, Gudny Vang og David Andreassen meta seg ikki føran fyri at taka avgerð í málinum út frá tí tilfarið sum fyriliggur, men heita á umsitingina um at fáa ta fakligu metingina sum stendur í avgerðini frá 14. november. Edva Jacobsen ynskir ikki at málið fellur, so arbeiði kann gerast liðugt í 2024. Edva Jacobsen ynskir at málið verður viðgjørt í býráðnum.

**Býráðið 28. november 2024:**
Atkvøtt varð fyrst um tilmælið frá Eivin Breiðaskarð. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum.



Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá Gudny Vang. Sonni á Horni, Gudny Vang, Ólavur Larsen og Leif André Eliasen atkvøddu fyri meðan hinir 5 býráðslimirnir atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Til síðst varð atkvøtt um tilmælið frá tekniska leiðaranum, saman við tilmælinum Eivin Breiðaskarð. 5 atkvøddu fyri uppskotinum meðan Sonni á Horni, Gudny Vang, Ólavur Larsen og Leif André Eliasen atkvøddu ímóti. Uppskotið varð tí samtykt.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Leif André Eliasen

Sonni á Horni

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Kristian Martin Petersen

Ólavur Larsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo